## Eftirlit við skipum

Ein nýggjur fylgisveinur skal halda eyga við skipaferðsluni kring Grønland, skrivar KNR. Verkfrøðilesandi á lærda háskúlanum í Aalborg hava gjørt ein fylgisvein, sum verður sendur upp við einari ballón frá einari støð í Norðursvøríki í dag. Fyglisveinurin, sum fer at sveima í 35 kilometra hædd, skal halda eyga við teimum sokallaðu AIS-tekinunum, sum størri skip skulu lata frá sær við jøvnum millumbili. Talan er um ein royndarfylgisvein. Tann endaliga útgávan, sum skal skal sveima í 700 kilometra hædd og halda eyga við skipum við Grønland, verður skotin út við einari rakett seinni.



## Kvinnur á Facebook

Teir flestu menninir munnu vera komnir til ta niðurstøðu, at tað eru kvinnurnar, sum brúka Facebook, og nú er tað eisini prógvað. Ein kanning, sum stovnurin Jon Lund hevur gjørt, og sum stendur í tíðarritinum "Women socialize", vísir, at kvinnurnar sita á Facebook, og at menninir hyggja eftir tíðindum, tá teir eru á telduni. Kanningin vísir, at 1,3 millión danskar kvinnur brúktu í meðal meiri enn 19 minuttir á Facebook í august mánaði. Menninir brúktu minni enn helvtina. Harafturímóti brúktu menninir munandi meiri tíð enn kvinnurnar til at lesa tíðindi á alnótini.

fær afturat í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010. Á íløgusíðuni fær ráðið umleið 26 milliónir krónur afturat og størsti parturin á íløgusíðuni í uppskotinum eru 28 milliónir krónur til skúladepil í Marknagili.

Samlaði raksturin verður somuleiðis umleið 20 milliónir hægri sambært uppskotinum. Hyggja vit at prosentunum av samlaðu køkuni, fær Mentamálaráðið í uppskotinum umleið eitt hálvt prosentstig afturat.




*Verður hugt at samlaðu íløgunum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010, sæst, at samanborið játtanina fyri inniverandi ár hava Mentamálaráðið og Almannamálaráðið fingið mest afturat til íløgur. Við sviðusoð er Innlendismálaráðið*

### Heilsumálaráðið

Samlað fær Heilsumálaráðið 9 milliónir krónur afturat til íløgur, og samlaða rakstrarjáttanin er vaksin við næstan 20 milliónum krónum. Íløgurnar liggja millum annað í víðari umvælingini av sjúkrahúsinum, sum liggur á 34 milliónum krónum í uppskotinum til fíggjarlóg. Og Klaksvíkar sjúkrahús hevur fingið 3 milliónir krónur til íløgur í mun til 1 millión í 2009.

Somuleiðis hevur Suðuroyar sjúkrahús fingið 1,5 millión krónur afturat til íløgur. Alt er til umvæling og viðlíkahald.

Á rakstrarjáttanini síggja vit millum annað, at Landsjúkrahúsið hevur fingið umleið 14 milliónir krónur afturat til rakstur.

### Almannamálaráðið

Størsta partin av fíggjarlógini eigur Almannamálaráðið, og sambært fíggjarlógaruppskotinum fær ráðið enn meiri pening í 2010. Næstan 68 milliónir afturat fær ráðið at ráða yvir. Verður hugt at íløgunum sæst, at umleið 33,5 milliónir krónur kunnu verða afturat til íløgur. Av hesum, sum eru komnar afturat í uppskotinum, skulu umleið 27 milliónir nýtast til eldrasambýli. Umframt, at næstan 5 milliónir afturat skulu nýtast til bústovnar. Somuleiðis fær sjálvsognarstovnurin Alv 2 milliónir afturat.

Í rakstrarpartinum verða umleið 34 milliónir krónur afturat. Umleið 19 milliónir koma afturat rakstrinum í vanligu forsorgini og umleið 10 milliónir koma afturat til fyritíðarpensjón. Hesar eru báðar lógarbundnar játtanir.

### Innlendismálaráðið

Ráðið, sum lutfalsliga hevur mist mest pening er innlendismálaráðið. Næstan 30 milliónir krónur færri eru til íløgur, og hetta kemst fyrst og fremst av, at játtanin til nýggjar vegir er skerd við 42 milliónum krónum.

Hinvegin eru millum annað 22 milliónir komnar í fíggjarlógaruppskotið til bjálving av almennum bygningum.

Raksturin verður í uppskotinum somuleiðis skerdur við umleið 44 milliónum krónum, og hetta sæst best aftur í stuðulsjáttanini á 42,5 milliónir krónur til Norðoyatunnilin, sum ikki er við longur. Tekniskt var hetta ein rakstrarjáttan. Somuleiðis verður raksturin hjá Landsverki skorin við umleið 14 milliónum.

Tó er annar rakstur sum hækkar.

### Uttanríkisráðið

Peningaliga minsta ráðið á fíggjarlógini fær nakrar milliónir afturat at ráða yvir, um fíggjarlógaruppskotið verður verandi. Vanligi raksturin hjá ráðnum er minkaður eitt vet, men meiri peningur er fingið til vega at marknaðarføra Føroyar. Talið er 5 milliónir krónur. Hetta hevur við sær, at samlaði raksturin hjá ráðnum er vaksin við umleið 3 milliónum, og hevur við sær, at parturin av fíggjarlógini kann blíva til næstan 1,1 prosent í mun til 1,05 prosent í 2009.




*Hyggja vit eftir rakstrinum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2010, síggja vit, at Innlendismálaráðið, Vinnumálaráðið og Fiskimálaráðið skulu skerja. Fíggjarmálaráðið verður um tað sama, og hini kunnu hækka raksturin eitt vet*